

Starvið verður at seta 3. januar 2011, ella eftir nærri avtalu.

# TEKNISKUR LEIÐARI

TIL RUNAVÍKAR KOMMUNU

Søkt verður eftir Tekniskum leiðara til Runavíkar kommunu

**Høvuðsverkevni**

- Leiðsla á Teknisku deild
- Projekteringsarbeiði og eftirlit
- Uppmátingar-, kortleggingar- og skrásetingararbeiði
- Býar- og byggiplanlegging
- Málsviðgerð og ráðleggingararbeiði
- Stýring av kommunalum viðlíkahaldsarbeiði
- Luttøka í dagligum umsigarligum. uppgávum v.m.
- Fíggjarligt eftirlit við tekniska økinum

**Førleikakrøv**

- Verkfrøðingur, arkitektur, byggifrøðingur ella onnur viðkomandi útbúgving
- Royndir í omanfyri nevndu arbeiðsøkjum
- Førleika í projekteringsarbeiði og byggilist
- Munnligan og skrivligan málførleika (eisini enskum)
- Hollan telduførleika
- Opin og fyrikomandi
- Leiðsluroyndir/-førleikar

Løn sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til borgarstjóran á telefon 41 70 00.

Skrivlig umsókn, saman við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 11. oktober 2010.

Um ikki nóg nógvir skikkaðir umsøkjarar eru, skilar kommunan sær rætt til at søkja av nýggjum.

Boks 139, Heiðavegur 26, 600 Saltangará
Tel 41 70 00, runavik@runavik.fo
www.runavik.fo

RUNAVÍKAR KOMMUNA

Runavíkar kommuna er trið størsta kommuna í landinum og búgva uml. 3.800 fólk í teimum 15 bygdunum, sum hoyra til kommununa. Á Teknisku deild, sum er eitt spennandi og fjølbroytt arbeiðspláss, starvast 2 byggifrøðingar, umframt leiðaran. Harumframt hava umleið 15 starvsfólk beinleiðis tilknýti til leiðaran á Teknisku deild.

KREA · TEL 60 80 80






Røðari verður Bernardette Goulding, ið starvast hjá felagsskapinum Rachel´s Vineyard í Írlandi. Hon fekk sjálv fosturtøku framda og kennir pínuna, skommina, skuldarkensluna og sjálvfordømingina, ið henda gerð gevur.

- Við fosturtøku gevst eitt hjarta at sláa, og eitt annað brestur, sigur Bernardette Goulding.
- Tað er trupult hjá kvinnum, sum hava fingið fosturtøku framda, at syrgja sítt mista barn. Tá er einki lík, eingin jarðarferð, eingin grøv, eingir vinir og eingin familja at hjálpa tær at syrgja.
- Ein kvinna segði mær: "Hvussu kann eg syrgja eitt barn, hvørs lív eg havi endað? Tá eg valdi at fáa fosturtøku, gav eg tá ikki rættin til at syrgja frá mær?"
- Hesar kvinnur, sum hava valt fosturtøku, eru okkara døtur, konur, skyldfólk og vinir. Ov ofta bera tær eitt fjalt sár í hjartanum, sum opnast aftur, hvørja ferð tær hoyra eitt pinkubarn gráta, síggja eina kvinnu við barn ella hoyra fosturtøku nevnda.
- Ein og hvør fosturtøka er eitt andlát í familjuni. Aftan á andlát tørvar tær at syrgja. Við fosturtøku hevur tú ikki loyvi at syrgja.

Fá meira at vita á www.rachelsvineyard.org og www.provita.fo

*Øll áhugað eru vælkomin!*

føroya PROVITA

www.provita.fo

KREA · tel 60 80 80





# Roknskaparleiðari

Tórshavnar havn umsitur øll havnaløgini og bátahylarnar í kommununi. 2.300 skip leggja til bryggju árliga, harav 50 ferðafólkaskip. Tað er vakt á havnarskrivstovuni á Eystaru bryggju alt samdøgrið, har tað tilsamans arbeiða 14 fólk.

Tórshavnar havn søkir eftir roknskaparleiðara, at standa fyri dagliga bókhaldinum, sum m.a. umfatar fíggjarbókhald, skuldara- og ognarabókhald, kontering, bóking, avstemman av bókhaldi, avgreiðslu av lønum og mánaðarligar roknskapir.

Av tí at arbeiðsplássið er lutfalsliga lítið, kann roknast við øðrum smærri uppgávum.

Bókhaldsskipanin Navision verður brúkt.

Tú hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum, og hevur ein kundavinarligan framburð.

Rokna verður við, at tú hevur útbúgving og royndir, sum gera teg skikkaðan at røkja starvið.

Starvið er lønt í 6. flokki sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og KAF.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jónsvein Lamhauge, havnarmeistara, tlf. 311762.

Umsóknir til starvið, skulu verða Tórshavnar havn, Postboks 103, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 23. september 2010, kl. 10.00.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

TÓRSHAVNAR HAVN